# H71

faldari 5

COCA COLA-KAPPINGIN

## H71 - StÍF

Leygardagin 16. jan. kl. 18.00

Hoyvíkshøllin



SUÐUROYAR SPARIKASSI

J&K

BONUS -er biligari!

P/F THOMAS DAM

polytan

Advokatfelagið Yviri við Strond 4

Auto Service

INNI

# FOKUS 18:29

## Lætt og stuttligt



Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

AnniJanni

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv léttari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**





# STATUS FYRI 2015

**NÚ ÁRIÐ 2015 ER FARIÐ VÆL AFTUR UM OG FARAST SKAL UNDIR NÆSTU HELVT AV HONDBÓLTSKAPPINGINI *2015/2016* ER GOTT HØVI TIL, AT GERA STØÐUNA UPP ELLA SUM MAN SIGUR Á HANDILSMÁLI – HAVA GOYMSLUTELJING.**

*Orð: Gunnar Djurhuus*

Eisini byrjar nú seinna helvt av hondbóltsárinum 2015/2016, har landskappingin er byrja aftur fyrst í januar fyri síðani at liggja still frá miðum januar fyri at geva rúm fyri steypakappingini sonevndu Coca Cola kappingini.

Og sum ein síðugevinstur, fyri tey hondboltsáhugaði *(ella hondbóltsgalnu)*, so verður EM fyri menn í Pólandi seinnu helvt av januar.

**Uppgerð yvir støðuna hjá monnum og kvinnum 1. januar 2016:**

| Kvinnur: | Nr.: |
|---|---|
| 1. deild | 1 |
| Ge. 17a | 1 |
| Ge. 17b | 10 |
| Ge. 14a | 2 |
| Ge. 14b | 1 |
| Ge. 12a | 1 |
| Ge. 12b | 3 |
| Ge. 10a | 1 |
| Ge. 10b | 1 |
| Ge. 10c | 2 |

| Menn: | Nr.: |
|---|---|
| FTZ | 1 |
| 1. deild | 1 |
| 2. deild | 1 |
| Dr. 18 | 2 |
| Dr. 16 | 2 |
| Dr. 14a | 1 |
| Dr. 14b | 4 |
| Dr. 14c | 1 |
| Dr. 12a | 1 |
| Dr. 12b | 6 |
| Dr. 12c | 3 |
| Dr. 12d | 2 |
| Dr. 10a | 1 |
| Dr. 10b | 2 |
| Dr. 10c | 2 |
| Dr. 10d | 9 |



Sum sæst á yvirlitinum, so liggja øll okkara A-lið, bæði hjá monnum og kvinnum, innan topp 2 *(10. fyrstapláss og 3. onnur pláss)*.

Í hinum bólkunum hava vit 3. fyrstapláss, 3. annaðpláss, 2. triðapláss, 1. fjórðapláss, 1. sættapláss, 1. nýggjandapláss og 1. tíggjandapláss.

Eftir at verða liðugur við „goymsluteljingina" kann ein staðfesta, at tað er ikki bara løtuverk at fá gjørt støðuyvirlit yvir øll okkara lið í FM. Kann kanska ikki samanberast við goymsluteljing hjá Poul Hansen ella Valdemar Lutzen, men tó so, tá ið tað ræður um hondbólt so hava vit í Hoyvík nógv størstu goymsluna – heili 29. lið luttaka í Fm kappingini. Næststørsta felag í Føroyum *(Neistin)* hevur 23 lið í FM kappingini.

Nú kann onkur so spyrja um tað bara er sjálvsagt, at H71 fær so góð úrslit í øllum aldursbólkum og um slíkt avrik verður kravt av eini hondbóltsbygd við so nógvum íbúgvum og við egnari høll?

Til hetta kann svarast, at tað er eingin sjávfylgja at eitt felag megnar at liggja í toppinum í øllum deildum, bara tí tað hevur eitt stórt fólkagrundarlag. Ein sær í øðrum feløgum, at leiðslunar tilvita royna at avmarkað mongdina av spælarum, tí tær vita væl, at fleiri lið *(serliga í einum aldursbólki)* krevja nógv størri orku, serliga um talan er um B, C, D og E lið. Hesi lið hava oftani ikki sama status millum leiðslu, venjarar og foreldur í mun til eitt A-lið. Eisini eru dømi um feløg, sum hava sera góðar hallarumstøður, men tó sera trupult við at halda ungdóminum til.

*framhald á síðu 13*




# Avatara

## Ein heilt nýggj og serstak verð innan gólv

**AVATARA**

Avatara er eitt gólv við fyrimunum frá bæði tí slitsterka laminatgólvinum og tí ektaða parkettgólvinum. Nýggja avataragólvið líkist fullkomiliga einum trægólvi, hevur træstruktur og er mjúkt og heitt, júst sum træ. Samstundis er avataragólvið líka slitsterkt sum eitt laminatgólv og krevur einki viðlíkahald. Prísurin er heldur ikki at fara skeivur av: Avataragólvið er munandi bíligari enn eitt parkettgólv.



- **Júst sum træ at síggja til**
- **Strukturin kennist sum træ**
- **Heitt og mjúkt at ganga á**
- **Luktfrítt og heilsugóðkent**
- **Slitsterkt sum laminatgólv**

Prísir úr 158,- fyri m²

30 ára garanti

NÓGV YMISK & SERA VØKUR MYNSTUR

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN


Lundin Financials
Lundin Løn
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN


VANILJU
KREM
Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
Nýggj vøra!
SENDISTOVAN

NordikSOLO 18+

# Kom best frá byrjan við NordikSolo

Ert tú millum 18 og 28 ár, kanst tú gerast NordikSolo kundi og fáa eina rúgvu av ókeypis tænastum og serliga góðum rentum.




Vitja www.banknordik.fo/solo og gerst NordikSolo kundi.

BANKNORDIK

SENDISTOVAN

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F **Hjá Fróða**

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

fk

Keyp ein Toyota - og fá ein 3 ára servicepakka

**Ongar útreiðslur til viðlíkahald í 3 ár**



**REYNI SERVICE**
tel. 35 30 40 - www.reyniservice.fo


Dekk
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
- sjálvandi frá Bilrøkt!
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo


WAAG
& COMPANY
WAAG & Co. P/f
Hoyvíksvegur 63
110 Tórshavn
Tel: 31 36 66
waag@waagbilar.fo
www.waagbilar.fo
OPIÐ ER: MÁNADAG - FRÍGGJADAG: 8.00 - 17.00
WAAG
& COMPANY

vistir.fo
haraldsen






## AVSLÁTTARSKIPAN

### BETRI TÚ ERT TRYGGJAÐUR -

# STØRRI AVSLÁTTUR

| 2 tryggingar | 3 tryggingar | 4 tryggingar | 5 ella fleiri | 5 ella fleiri + Betri pensjón |
|---|---|---|---|---|
| -3% | -8% | -12% | -15% | -32% |

Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avslátti av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

**Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avslátti**

*Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.*

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

## ÁTAKSTILBOÐ:
## LUKSUS FAMILJUBILUR ÚR 390.000 KR



### NÝGGJUR VOLVO V70 TRIBUTE
### EITT SINDUR MEIRI AV TÍ GÓÐA TIL TÍN

Volvo V70 er ein sannur svenskur stationbilur. Stórur, hegligur, tryggur og sannførandi gjøgnumførdur úr enda í annan. Tann nýggi Tribute frá 2016 er veruligt skandinaviskt marglæti í teirru góðu og kendu Volvogóðskuni og við einum longum lista av útgerð. Fíggjarliga kanst tú gera kubbið júst nú bæði í mun til sjálvan bilin og í mun til útgerðspakkan. Bóka ein royndartúr hjá Wenzel

**ÚR 390.000 KR**

P/F Wenzel | Akranesgøta 5 | FO-100 Tórshavn | tel 35 45 00 | fordpost@wenzel.fo | www.wenzel.fo

**WENZEL**



NORÐOYA SPARIKASSI

## Orkulán 2,5%

*- Bústaðarlán við lágari rentu*

***Bílegg eitt kundaprát***
*og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkuláninum*



*Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo*

*framhald av síðu 4*

H71 hevur sum aðalmál, at verða eitt hondboltsfelag fyri øll. Hetta krevur eina sera málrættaða, nærlagda og virkisfýsna leiðslu, sum hevur eina breiða vitan um øll lið hjá felagnum. Somu krøv skulu setast til venjingarmongd og dygd hjá einum spælara á ein D-liði sum hjá einum á A-liðinum. Hetta haldi eg er hepnast væl hjá H71 og er støðuga framgongdin í mongdini av spælarum og teirra førleikum eisini ein góð ábendig um dygdargóða leiðslu og venjarar – í so máta. Eisini sæst hetta aftur í at vit ár undan ári megna at klekja nýggjar leikarar til bestu deildina har aðalmáli má verða at nýta egið tilfeingi sum tó kann fáa íblástur og styrk uttanífra. Størsta avmarkingin í vøkstri og menning er uttan iva avmarkaða talið av hallartímun og hóast vit hava 29 lið so eiga vit ikki allar tímarnar í Hoyvíkshøllini. Gongdin seinastu árini er, at kropsliga venjingin í størstan mun ferð fram aðrastaðni enn á hondbóltsvøllinum til tess at gagnnýta hallartíðina best møguligt.

Leikluturin hjá foreldrum og stuðlum skal heldur ikki undirmetast í hesum sambandi. Tað er sera umráðandi at tey avvarðandi hjá einum barni, sum ikki kemur á eitt A-lið í byrjanini, geva sínum barni eins góðan stuðul ella størri í strembanini eftir, at halda mótinum uppi og til at leggja allar kreftir í venjing og dystir soleiðis, at viðkomandi hevur størri møguleika fyri at koma á eitt A-lið seinni.

Um stutta tíð byrjar so steypakappingin og verður tað sera áhugavert at síggja, um H71 megnar líka góða umboðan í finalunum, sum seinasta ár. Í fjør vóru 6 av 8 liðum í ungdómsfinalunum, meðan fremsta liði ikki megnaði at spæla seg í finaluna. Mann skal ikki selja skinnið áðrenn bjørnin er skotin verður sagt, men uttan at taka munnin ov fullan so eru tekin um, at møguleiki er fyri minst líka góðari ella betri umboðan í ár. Eitt felag við stórum ambitónum skal so altíð hava sum høvuðsmál, at betra um úrslitini. Hetta er eisini fyrsta árið, at H71 hevur umboðan á kvinnusíðuni í steypakappingini og nýta vit høvið til at ynskja teimum góða eydnu.

Um tað skuldi hent, at FTZ liði hjá H71 spælir seg í finaluna, so hevur ein leikari verði í øllum finalum í hansara aldursbólki síðani HFS byrjaði við hesum framúrskarandi tiltakinum við ungdómsfinalunum í Høllini á Hálsi og tað er 19 ára gamli Pætur Thomsen sum er knýttur at FTZ-hópinum.

Sum sagt, so er januaramánaði spekkaður við hondbolti og spennandi verður at fylgja við hvussu leikur ferð bæði her heima og á altjóða leikvøllum. Leygardagin 13. februar vita vit alt nógv betur tí tá verða finalurnar hjá kvinnum og monnum leiktar, ungdómsfinalurnar verða avgreiddar dagin eftir og besta landslið í Europa er eisini funnið *(EM finalan hjá monnum er tann 31. januar 2016 Í Krakow)*.

Eg vil at enda ynskja øllum okkara liðum góða eydnu við steypakappingini og FM. Vónandi kemur okkurt gullmerkið til Hoyvíkar aftur í ár.

**Gott nýggjár og takk fyri árið 2015.**

**Ítróttarfelagið Hoyvík H71**
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

**NEVND**
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

Randi Frederiksberg, 212000,
randi.frederiksberg@gmail.com

**ÁBYRGD AV FALDARA**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705
*Forsíðumynd: Jens Kr. Vang*

**ÚTGEVARI**
H71

VENJARAFRÁGREIÐING VEGNA

# KVINNURNAR Í HOYVÍK





**AT TAÐ ER GOTT AT VERÐA Í HOYVÍK OG Í H71, VÍSIR TANN GÓÐA TILGONGDIN ELLA STREYMURIN AV FÓLKI, SUM KOMA TIL FELAGIÐ OG KVINNUDEILDINA.**

Tá árið byrjaði, var ætlanin at gentur 17, skuldu hjálpa til at manna liðið, tí tað ikki vóru so nógvar til kvinnuliðið. Nú eru 28 á listanum, sum venja, tó so, allar venja ikki líka ofta. Og tað sera hugaligt at venja fólk, sum vilja læra og samstundis hava tað stuttligt.

Vit hava higartil verið tveir høvuðsvenjarar. Peter Krogh, sum spælir við besta mansliðnum, og eg sjálvur. Vit vita øll, at Peter er ein sera dugnaligur hondbóltsspælari, men harafturat er hann dámligur og dugir væl við gentunum. Við honum hava vit eisini fingið nógvan íblástur til venj-



» *Eingin ivi skal verða um, at ætlanin er at hava lið við í bestu kvinnudeildini um ikki so langa tíð, møguliga longu í næsta ár*

ingarnar. Nú hava vit býtt okkum soleiðis, at Peter K tekur sær av gentum 17, og eg taki mær av kvinnuliðnum.

Reglurnar hjá HSF eru soleiðis, at spælarar upp til 21 ár kunnu spæla við fleiri liðum sama dag. Hjá summum feløgum er tað so umráðandi at vinna næstbestu deild, at somu spælarar, sum eru í bestu deildini, eisini spæla við næstbestu deildini. Sostatt fáa tær, sum sita á bonkinum hjá besta liðnum, ikki nógva spælitíð, heldur ikki við næstbesta liðnum. Og tá velja tær at fara til onnur feløg, har tær sleppa at spæla, ella tær gevast.

Tveir teir fyrstu dystirnir vóru ímóti Kyndli og Neistanum. Liðini møttu upp við sterkastu manning úr Hvonn deildini og so sterka mótstøðu kláraðu vit ikki. Síðani hava vit vunnið seks dystir á rað og hava spakuliga etið okkum upp á eitt annað pláss. Til tann fyrsta dystin móti Kyndli vóru áskoðaraplássini í Høllini á Hálsi full av hoyvíkum, sum vóru sera spentir, nú tað endiliga var komið lív í aftur kvinnudeildina hjá H71. Sjálvt um tapið varð nakað stórt, var lagið gott, tí okkara kvinnur hingu í nokk so leingi. Spælið var gott, men tað er blivin betri so við og við.

Hetta árið skuldu vit smakka tað vaksna lívið, tí tær sum skuldu manna liðið, vóru árgang 97, gentur 17 seinasta ár. Men tilgongdin av spælarum aðra staðni frá hevur gjørt, at vit møguliga kundu havt meldað tvey lið til. HSF roynir nú at fáa eitt lið í triðbestu deild, og uppskot er komið um at skipa tað sum vikuskiftiskappingar. Inntil tá royna vit at gera tað soleiðis, at allar sleppa at spæla við.

Eingin ivi skal verða um, at ætlanin er at hava lið við í bestu kvinnudeildini um ikki so langa tíð, møguliga longu í næsta ár. Tað verður arbeitt við teimum ætlanum og hyggja vit longur niður, eru góðir árgangir á veg, so útlitini fyri kvinnuhondbólti í Hoyvík síggja heilt gott út.

**Petur Martin.**

# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN




**Aldur?**
23 ár.

**Hvørjum plássi spælur tú á?**
Strikuni.

**Hvør FTZ-leikari heldur tú er løgnastur?**
Tað má vera Samurai Tróndur.

**Dovnastur?**
Tað liggur millum Petur Krogh ella Gardar aka Djóni Gaard Joensen.

**Størsta „drama queen"-in?**
Hetta má fara til Mr. Hoydal.

**Brúkar longst tíð frammanfyri speglinum?**
Pætur Thomsen.

**Hevur goldið mest til bótakassan?**
Tað má vera Djóni Vest Højgaard, bara tí at Gardar ikki hevur betalt enn.

**Hvat er tín størsta/besta hondbóltsupliving?**
Vinna FM í 2012 sjálvandi.

**Hvørjum sangum lurtar tu eftir, tá ið tú ert í brúsu?**
Down By the Riverside var klassikarin, men nú lurti eg bara eftur onkrum.

**Nær fekst tú tín fyrsta muss?**
Tað má vera frá mammu ella babba fyri 23 árðum síðani.

**Vaskar tú tíni egnu venjingarlæðir?**
Nei.

**Hvønn persón samanberur tú teg onkuntíð við – í allari hemmeligheit?**
Hans Kára Hansen.

**Skoraði tú fleiri mál í tínum seinasta dystið, enn tú hevur skorað damur í tínum lívið?**
Nei.

**Hvat er títt yndlings #hashtag?**
#putinislove

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
At tað er í Hoyvík, og leikarnir.

**Hevur tú nakra flóvisliga hondbóltsøgu at fortelja?**
Ja, debut dyst hjá Boas :)

J&K

## ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J&K

# J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN



# Takk fyri at tú stuðlar Javna

## Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

## Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

estra VÁSTI

javni
Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo


VB



polytan®

simonsen@polytan.dk
tlf: 0045 39405420
fax: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu góðkent

# Er skeltingin í lagi?

Vilt tú síggja gott út, hava kundar í handilin ella bíleggingar til fyritøkuna, kann skeltingin gerast munurin millum at eydnast og ikki eydnast. Tað skal ikki altíð so nógv til, og tað nýtist ikki at kosta nógv.

**Hugsa stórt – hugsa Føroyaprent**



Á Føroyaprent hava vit eitt framkomið skeltiverkstað, har vit kunnu framleiða nærum alt, tú kanst hugsa tær.

- Lýsandi stavir á stórar bygningar
- Smá skelti sum t.d. navnaskelti til skrivstovuna
- Stórar plakatir og bannarar til tiltøkini í summar
- Foliuprent til veggir, vindeygu og bilin

Nethandil

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

Føroyaprent
Tel. 31 45 55 www.foroyaprent.fo




RÁKIÐ



VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til HITA
SANITET &
VENTILATIÓN

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000

www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

Eik

Coca-Cola MENN

# BÓLKASPÆL 2016

## Bólkur 1: H71, StÍF, Kyndil og H71 2

H71

### 1. UMFAR

| | |
|---|---|
| Týsdagin 12.01.2016 kl. 20.00 | StÍF – H71 2 |
| Sunnudagin 24.01.2016 kl. 16.00 | H71 – Kyndil |

### 2. UMFAR

| | |
|---|---|
| Leygardagin 16.01.2016 kl. 18.00 | H71 – StÍF |
| Sunnudagin 17.01.2016 kl. 16.00 | Kyndil – H71 2 |

### 3. UMFAR

| | |
|---|---|
| Mikudagin 27.01.2016 kl. 19.30 | H71 2 – H71 |
| Sunnudagin 31.01.2016 kl. 16.00 | StÍF – Kyndil |

## Bólkur 2: KÍF, VÍF, Neistin og Team Klaksvík

Steypafinalurnar í ár verða ætlandi leiktar **13. og 14. februar.**

### 1. UMFAR

| | |
|---|---|
| Leygardagin 16.01.2016 kl. 18.00 | KÍF – Neistin |
| Sunnudagin 17.01.2016 kl. 16.00 | VÍF – Team Klakvík |

### 2. UMFAR

| | |
|---|---|
| Mikudagin 20.01.2016 kl 20.00 | VÍF – Neistin |
| Leygardagin 23.01.2016 kl. 18.00 | Team Klaksvík – KÍF |

### 3. UMFAR

| | |
|---|---|
| Fríggjadagin 29.01.2016 kl. 20.00 | KÍF – VÍF |
| Sunnudagin 31.01.2016 kl. 16.00 | Neistin – Team Klaksvík |

# **LANDSPOLITKARAR** SVARA SPURNINGUM

**FÝRA LANDSPOLITIKARAR BÚGVA Í HOYVÍK. H71-FALDARIN HEVUR SETT TEIMUM NAKRAR SPURNINGAR. NÆSTUR AT SVARA SPURNINGUM ER KRISTIANNA WINTHER POULSEN, TINGKVINNA HJÁ JAVNAÐARFLOKKINUM**

**Hvat er tað besta við at búgva í Hoyvík?**

At eg kenni nógv fólk, at tað er stutt til tað mesta, og at børnini í Hoyvík hava bæði H71 og Klubb 188. Tveir barnaskúlar eru í bygdini, og so liggur studentaskúlin jú eisini her í Hoydølum, har útivið túsund næmingar og lærarar hava sín gerandisdag.

Hoyvíkin liggur væl fyri, og ung og vaksin kunnu lættliga fara ein túr oman í býin, um her verður ov trongligt.

**Kennir tú teg sum hoyvíking?**

Ja, og tað við stórum H. Eg havi búð her, síðan eg varð født. Havi havt onkrar pausur, í øðrum londum tá eg tók útbúgving, og so í Havn í nøkur fá ár. Eitt sindur bygdasligt kanska, soleiðis at venda aftur til pattuna, men eg trívist væl her í Hoyvík.

**Hvat merkir tað fyri teg at vera hoyvíkingur?**

At eg veit, hvar eg hoyri til, og hvaðani eg eri.

Eg havi ongantíð verið partur av hørðu kjarnuni, tí at ítróttur ikki hevur verið mítt høvuðsfrítíðarítriv. Men eg spældi borðtennis og hondbólt í nøkur ár.

Eg fekst nógv við tónleik, so sum at spæla í GHM, og tað fór fram í Havn.

Men hinvegin er eingin ivi fyri meg um, at eg eri hoyvíkskona og ikki havnakona.

Og tað er stuttligt at hitta fólk, sum eg vaks upp saman við, tí vit hava felags minnir og felags upplivingar at tosa um, sjálvt um vit kanska ikki kendust so væl sum børn og ung.



*Kristianna býr í Maritugøtu í Hoyvík saman við soninum Gunnar, sum er 15 ár.*

**Hvar í Hoyvík dámar tær best at ganga túr**

Í fríøkinum niðanfyri Skraddaragøtu og yvir ímóti Svartafossi er vakurt. Tað er deiligt at ganga gjøgnum plantasjuna oman á Boðanes og oman á Støðna. Og frá Støðni, framvið Heljareyga og yvir móti Kúrbergi er eisini ein deiligur og flottur túrur, sum liggur burtur frá alfaravegi.

Hinvegin sakni eg, at meira verður gjørt burturúr at fáa vøkur úti-øki uppi á Løgmannabreyt, Millum Gilja og hini støðini, har so nógv hús eru bygd seinastu 20 til 30 árini.

**Fer Hoyvíkin, H71 og hoyvíkingar á nakran hátt at merkja, at tú ert komin á ting?**

Ja.

Sum restin av Føroyum fara hoyvíkingar eisini at merkja, at hendan samgongan vann valið 1. september.

Vit hava framt nógvar broytingar, sum eru góðar fyri samfelagið og einstaka menniskjað, so sum skattalætta til lág- og miðallønt, longri barnsburðarfarloyvi, eisini til pápan, stuðul til fíggjarliga sperdar barnafamiljur, dagføring av heilsuverkinum, broytt kringvarpsgjaldið, so at tað er sosialt rættari, møguleika fyri at lærarar og skúlaleiðslur kunnu førleikamenna seg, fyri at nevna nøkur heilt fá av teimum nógvu økjunum, har vit hava framt broytingar. Eisini er ÍSF uppraðfest, og hetta man H71 eisini fara at merkja.

> ***Eg havi ongantíð verið partur av hørðu kjarnuni, tí at ítróttur ikki hevur verið mítt høvuðsfrítíðarítriv. Men eg spældi borðtennis og hondbólt í nøkur ár***

**Hvørji eru tíni hjartamál?**

Góðan møguleika fyri útbúgving fyri bæði gentur og dreingir.

Góða atgongd til at njóta mentan og list. Ítróttur er ein partur av hesum øki og hevur stóran týdning fyri sosiala og likamliga trivnaðin hjá nógvum børnum og vaksnum.

Og so at Føroyar eru eitt land, har menniskju í øllum aldri og av báðum kynum hava hug at búgva og har gerandisdagurin gevur meining og er góður fyri allar samfelagsbólkar. Her spælir livikostnaður inn, eins og ein góð heilsa, bæði likamlig og sálarlig.

**Hevur tú nakrantíð spælt hondbólt? Hvat á vøllinum spældi tú tá? Og við hvørjum?**

Ja, eg havi spælt hondbólt við H71. Eg spældi á vonginum. Men eg má viðganga, at tað ongantíð bleiv mín heilt stóra passión at spæla hondbólt.

Annars var Mena Joensen úr Kyndli the shit tá. Hon var líka so legendarisk sum Anja Andersen. Og tær genturnar úr Hoyvík, sum dugdu væl og sum veruliga vildu spæla hondbólt, fóru oman í Kyndil ella Neistan, tí at har var venjingin fyri gentur nokk betur skipað, enn hon var í Hoyvík tá.

Eg havi eisini spælt borðtennis við H71. Tað var ótrúliga stuttligt at venja borðtennis í Hoyvíkar skúla. Har vóru nógv børn og ung, sum vandu saman. Og vit samlaðust utttanfyri fimleikarhøllina um kvøldarnar, áðrenn vit blivu so vaksin, at vit fóru heilt oman í býin. Í kava skreiddu vit í Snobbabrekkuni, sum Mannbrekka æt tá, og vit skoytaðu á Tútakannutjørn, har kirkjan er í dag.

Um vit veruliga skuldu út á villar víddir, fóru vit heilt niðan á Myllutjørn at sigla á tundurflaka, men tað var langt at ganga.

**Heldur tú við H71?**

Sjálvandi geri eg tað. Er nakað annað lið at halda við?

**Ert tú nakrantíð til hondbóltsdyst?**

Ja, men ikki nóg ofta.





*Ein góð løta saman við vinku og nevndarlimi í H71: Bergtóra og Kristianna í 2010 á veg til Grønadal í Suðurgrønlandi umborð á verjuskipinum Ejnar Mikkelsen í politiskum ørindum.*

Eg var til ein dyst hjár B-liðnum hjá Gentum 10 ár nú ein dagin. Tær smurdu hinar av. Tað er stuttligt at síggja, hvussu væl børnini duga, og at eisini genturnar eru so væl við. Fyrr máttu tær, sum vóru góðar og sum ynsktu at spæla hondbólt, fara oman til Havnar at spæla. Men nú verður ikki leingi, til vit fáa fyrsta føroyameistarskapið fyri kvinnur niðan í Hoyvíkina.

Øll hesu flottu úrslitini í øllum deildum hjá bæði gentum og dreingjum, monnum og skjótt eisini kvinnum er úrslitið av einum fantastiska flottum og fokuseraðum arbeiði hjá nevndini og hjá venjarum. Takk fyri tað!

**Hevur hondbólturin nóg góða raðfesting á landsins fíggjarlóg? Grundgev.**

Hondbóltur er ikki beinleiðis á landsins fíggjarlóg, men ÍSF fær góðar 7 milliónir krónur um árið, og tey 15 sersambondini, eisini Hondbóltssambandið, fáa so burturav hesum pengunum.

Hondbóltsfeløgini hava atgongd til at venja í ítróttarhallunum kring landið. Tað er tó kommunurnar, og ikki landið, sum standa fyri hesum økinum.

Vit skulu minnast til, at øll tey 400 børnini, sum spæla hondbólt í H71 ikki høvdu havt hendan møguleikan, um ikki so nógv sjálvboðin ung og vaksin vóru við í arbeiðinum at útvega pengar, at skipa venjing og kappingar og alt hitt arbeiðið, sum er neyðugt fyri, at felagið kann koyra so væl.

Hoyvíkshøllin treingir til fleiri útbyggingar, millum annað í mun til áskoðarapláss, tí har er næstan ikki inniverandi, tá stórdystir eru. Men hetta er ein kommunalur spurningur, heldur enn ein spurningur fyri Løgtingið.

Og sum heild er trýstið stórt á hallirnar í Tórshavnar kommunu, har nógv feløg skulu býta tímarnar at venja og at spæla ímillum sín.

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT





ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SENDISTOVAN


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700


Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:

# h71 klæðini 2015/16



H71 INTERSPORT Thomas Dam Ítróttur adidas


Vælkomin inn á
gólvið hjá okkum
... her finnur tú
altíð okkurt!
pf Skálabúðin
DR. JACOBSENSGØTA · TEL. 315 315


Matstovur keypa gass
og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909


SKORA
VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór

FAROE SHIP

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum skatti

Afturrindan av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**





*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*

Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoy-varar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com




SENDISTOVAN

amr.fo

# TEY SVØRTU TØLINI

## DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í FTZ DEILDINI

| Dato | Heimalið | Útilið | Úrslit |
|---|---|---|---|
| 23.09.2015 | H71 | Neistin | 27-16 |
| 26.09.2015 | H71 | StÍF | 25-22 |
| 04.10.2015 | VÍF | H71 | 25-30 |
| 11.10.2015 | H71 | T. Klaksvík | 31-23 |
| 15.10.2015 | Kyndil | H71 | 22-25 |
| 01.11.2015 | KÍF | H71 | 20-25 |
| 11.11.2015 | StÍF | H71 | 21-27 |
| 15.11.2015 | H71 | VÍF | 28-24 |
| 18.11.2015 | Neistin | H71 | 16-26 |
| 21.11.2015 | T. Klaksvík | H71 | 24-37 |
| 29.11.2015 | H71 | Kyndil | 29-24 |
| 13.12.2015 | H71 | KÍF | 24-19 |
| 16.12.2015 | H71 | StÍF | 21-22 |
| 19.12.2015 | Neistin | H71 | 20-20 |
| 06.01.2016 | VÍF | H71 | 19-17 |
| 09.01.2016 | H71 | T. Klaksvík | 38-21 |
| 17.02.2016 | H71 | Kyndil | |
| 28.02.2016 | KÍF | H71 | |
| 06.03.2016 | H71 | Neistin | |
| 13.03.2016 | StÍF | H71 | |
| 19.03.2016 | H71 | VÍF | |
| 23.03.2016 | T. Klaksvík | H71 | |
| 03.04.2016 | Kyndil | H71 | |
| 16.04.2016 | H71 | KÍF | |

## STØÐAN FTZ DEILDIN

| Nr. | Lið | Dystir | V.m | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | H71 | 16 | 430 | 338 | 92 | 27 |
| 2 | VÍF | 16 | 426 | 407 | 19 | 21 |
| 3 | KÍF | 15 | 371 | 334 | 37 | 19 |
| 4 | Kyndil | 16 | 424 | 396 | 28 | 18 |
| 5 | StÍF | 15 | 392 | 390 | 2 | 13 |
| 6 | Neistin | 15 | 344 | 367 | -23 | 10 |
| 7 | T. Klaksvík | 15 | 341 | 496 | -155 | 0 |

*Dagført: 13.01.16*

# LIÐINI HESUFERÐ

## H71

**Málmenn:**
1 Ári E. Dam
12 Tóraldur Kollsker
16 Johan Hofgaard

**Útileikarar:**
2 Djóni Vest Højgaard
3 Mark Lausen Marcher
4 Rúni Vest Højgaard
5 Rasmus Rasmussen
6 Boas Heinesen
8 Pætur Thomsen
11 Hans Kári Hansen
13 Oddur Bech
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
18 Andor Sivertsen
22 Helgi Hoydal
23 Hilmar Leon Jakobsen
45 Peter Krogh
89 Jónas Djurhuus
99 Tróndur Arge

*Venjarar:*
**Petur Mittún**
**Halgir Dahl Olesen**

*Málmansvenjari:*
**Jens à Skipagøtu**

*Liðleiðarar:*
**Petur Sivertsen**
**Rene Dahl Olesen**
**Andras Marr Poulsen**

## StÍF

**Málmenn:**
1 Isak Olsen
12 Eli Gærdum

**Útileikarar:**
2 Fríði R. Djurhuus
3 Leivur Justinussen
4 Tummas T. Simonsen
5 Pætur G. Joensen
6 Dávid Danielsen
7 Pætur Johansen
8 Teitur Nielsen
9 Sveinur Justinussen
10 Kjartan Johansen
13 Borgar M. Persson
14 Jogvan G. Joensen
16 Arnhold Berg
19 Marius Joensen

*Bonkur:*
**Pole J. Hansen**
**Levi Nybo**
**Niels Rósing Hansen**
**Sverri Jensen**

# »GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



## ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT